## Guily vil ikki til Onglands



Franski Ludovic Guily hevur havt eitt sindur trupult við at vinna fast pláss á liðnum hjá FC Barcelona, har aðrir offensivir spælarar eita Messi, Eto'o, Ronaldinho og nú eisini Henry. Hóast útlit eru til nógva tíð á beinkinum, hevur Guily gjørt av, at hann ætlar sær at spæla í Barcelona næsta kappingarár. Feløg í Onglandi hava ligið fram við eftir kvika franska spælaranum, men hann hevur víst tilboðini frá sær.

## Liverpool selir álopsspælarar

Liverpool hevur gjørt sáttmála við álopsspælararnar Fernando Torres og Andriy Voronin, og tað hevur við sær, at felagið sleppur sær av við tveir aðrar álopsspælarar í felagnum. Craig Bellamy verður seldur til West Ham, og Djibril Cissé verður seldur til Marseille. Hildið verður, at Liverpool fær umleið 150 milliónir krónur burtur úr at selja Cissé og Bellamy.

# Heiðursmerki á skeivum teinum

**Anna Karina Ottosen svam, súkklaði og rann seg til bronsu heiðursmerki á Oyggjaleikunum. Harumframt fekk kvinnuliðið silvur. Okkurt bendir tó á, at hesi úrslit eru fingin á skeivum teinum**

TRIATLON

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyrst og fremst var tað ein ógvuliga fegin Anna Karina Ottosen, sum eftir tveir tímar og 21 minuttir kom á mál, eftir at hon hevði luttikið í triatlon á oyggjaleikunum á Rhodos.

– Nú eri eg øgiliga glað, segði hon, meðan hon rindaði møðina í hitanum á Rhodos. Anna Karina Ottosen var tó ikki móðari enn so, at hon hevði yvirskot at práta við bæði fjølmiðlar, liðfelagar og kappingarneytar.

– Nei, man er væl í form, helt hon skemtandi fyri, tá hon varð spurd um, hvar henda orkan kom frá.

Tilsamans hevði hon, eins og allir hinir íðkararnir ið komu á mál, svomið 1500 metrar, súkklað 40 kilometrar og runnið 10 kilometrar.

### 3, 4 og 5

Anna Karina var tann fyrsta føroyska kvinnan, sum kom á mál. Henni á baki kom Súsanna Skylv Sørensen og síðani Joan Bláfoss. Hetta merkir, at umfram bronsu í einstaklingakappingini, so fingu Føroyar eisini silvur í liðkappingini við tíðini 4 tímar, 42 minuttir og 24 sekund. Eitt sera gott og flott úrslit frá føroysku kvinnunum.

Hjá monnunum var tað rættiliga langt frá heiðursmerkjaplássum. Teir kunnu tó saktans vera ernir av sínum úrslitum. Fyrstur á mál var Guðmundur Nielsen við tíðini tveir tímar og 13 minuttir, og tað rakk til eitt 16. pláss. Næsti maðurin kom á mál tveir minuttir seinni, og var tað Andrass Joensen sum fekk eitt 23. pláss. Tvey pláss aftanfyri hann var Áslakkur Nesá við tíðini 2.17,45. Samlaða úrslitið hjá monnum rakk til eitt fimm pláss.

### Skeivir teinar

Men nógv bendir á, at góðu úrslitið eru vunnin á skeivum grundarlag. Skeivum grundarlag skilt á tann hátt, at teinarnir, sum kappast var á, ikki vóru heilt rættir. Hetta vita triatloníðkararnir tó ikki við fullari vissu, men nógv bendir á at so er.

Í hvussu so er um metast skal út frá tíðunum hjá einstøku íðkarunum. Eitt nú brúkti Guðmundur Nielsen 22 minuttir um at svimja teir 1500 metrarnar, meðan hann vanliga klárar teinin undir 20 minuttir, og Joan Bláfoss svam til 28 minuttir, har hon vanliga svimur til umleið 24 minuttir. Eisini Súsanna Skylv Sørensen og Ottar í Hjøllum brúkti ov langa tíð um teinin.

Í renningini bendir alt á, at teinurin var ov stuttur. Til dømis rann Joan Bláfoss teir tíggju kilometrarnar til tíðina 35,54, har hon vanliga brúkar umleið 37 minuttir um teinin. Í súkklingini sær tó út til, at teinurin var á góðari leið.



*Kvinnuligu triatloníðkararnir skaffaðu Føroyum silvur sum lið, og bronsu sum einstaklingar*



*Nógv bendir á, at teinarnir í svimjingini og renningini vóru skeivir*

## Støður í triatlon:

**Kvinnur**:
3. Anna Karina Ottosen, 2.21,02
4. Súsanna Skylv Sørensen, 2.21,22
5. Joan Bláfoss, 2.23,31

**Menn**:
16. Guðmundur Nielsen, 2.13,37
23. Andrass Joensen, 2.15,52
25. Áslakkur Nesá, 2.17,45

**Kvinnur, lið**:
2. 4.42,24

**Menn, lið**:
5. 6.47,14

## Besta úrslitið nakrantíð

**Hóast Jersey á seinasta kappingaredegnum legði Føroyar væl afturum, so stendur annað plássið í samlaða yvirlitinum sum besta føroyska oyggjaleikaluttøkan nakrantíð**

OYGGJALEIKIR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vóru svimjararnir og bogaskjúttarnir, sum drógu stóra hálið, tá føroysku heiðursmerkini skuldu teljast upp. Í samlaða yvirlitinum vóru Føroyar eitt skifti á odda, men hósdagin smoygdi Jersey seg framum, og fríggjadagin løgdu tey veruliga sjógv ímillum, soleiðis at teir at enda vóru rættiliga sannførandi sum sterkasta landið á oyggjaleikunum.

Men úr einum føroyskum sjónarhorni var talan um serstakliga væleydnaða luttøku. Ikki færri enn 24 ferðir veittraði Merkið ovast, tá gullmerki skuldu latast, og tað eru nógv fleiri, enn vit nakran tíð hava roynt áður.

**Í samlaða yvirlitinum gjørdist heiðursmerkjabýtið hetta:**

| Nr | Land | G | S | B |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jersey | 30 | 35 | 27 |
| 2 | Føroyar | 24 | 19 | 12 |
| 3 | Guernsey | 23 | 23 | 29 |
| 4 | Gotland | 23 | 21 | 10 |
| 5 | Rhodos | 22 | 14 | 16 |
| 6 | Isle of Man | 11 | 15 | 26 |
| 7 | Menorca | 11 | 9 | 10 |
| 8 | Cayman Islands | 11 | 7 | 5 |
| 9 | Bermuda | 8 | 13 | 15 |
| 10 | Áland | 7 | 8 | 10 |